# Tí eitt valdømi, Jógvan við Keldu

HEÐIN D. POULSEN



Løgtingslimur hjá Fólkaflokkinum, Jógvan við Keldu, hevur á heimasíðuni hjá Fólkaflokkinum og á *Nordlysid.fo* eina viðmerking til, hvat eg haldi um okkara valskipan. Jógvan við Keldu ynskir meg at greina nærri fyri mínum sjónarmiðum, og hví Føroyar valla kunnu samanberast við Grønland.

**Ódemokratisk skipan**

Verandi vallóg hevur við sær ódemokratiskar avleiðingar. Skipanin ger tað møguligt, at størsti flokkur í atkvøðum ikki gerst størsti flokkur á tingi. Somuleiðis er tað ójavnstøða í úrslitinum í prosentum, ið ikki er í samsvar við úrslitið í tingmonnum.

Í teimum valdømum, har tað skulu nógv færri atkvøður til fyri at velja ein tingmann, fáa teir flokkar fyrimun, sum hava undirtøku har.

Tá hugt verður eftir, hvussu nógvar atkvøður skulu til fyri at velja eitt tingumboð, so síggja vit eina grundleggjandi órættvísa skipan. Á valinum í 2004 fóru í Sandoyar valdømi 1.026 fólk á val fyri at velja tveir tingmenn. Ímeðan tað vóru 11.800 atkvøður fyri at velja teir 8 sum umboða Suðurstreymoy. Hetta merkir at 1.475 atkvøður skuldu til hvønn tinglim í Suðurstreymi, ímeðan tað einans skuldu 513 atkvøður fyri hvønn tingmannin hjá Sandoyar valdømi. Í Suðuroynni vóru tað 878 atkvøður uppá tinglimin, ímeðan tað í Eysturoynni skulu 1.380 atkvøður til fyri hvønn tinglim.

Tað er ikki talan um eina demokratiska skipan, tá atkvøður hjá summum persónum telja tríggjar ferðir so nógv sum aðrar, alt eftir hvar viðkomandi býr í landinum, tá ræður um at býta teir valdømisvaldu tinglimirnar.

Sjálvt tá teir fimm eykavaldu verða tiknir við í roknistykkið, er skipanin skeiv.

Við verandi skipan ber tað til at fáa ein meiriluta á tingi valdan við einum minniluta av atkvøðunum frá Føroya fólki. Hetta er ikki rættvíst. Hetta er ein ódemokratisk skipan.

**Grønland samanborið við Føroyar**

Tey sum ikki vilja hoyra talan um eitt valdømi, vísa tíðum til Grønland, har tey hava eitt valdømi, ið summi ikki halda er nøktandi. Hesi eru av tí áskoðan at Føroyar skal samanberast við Grønland í hesum málinum. Eg eri av tí áskoðan, at tað ber ikki til at taka eitt einstakt fakta frá einum landi og nýta tað til samanberingar við Føroyar. Serliga ikki Grønland, sum er so sera øðrvísi frá Føroyum.

Tey flestu vita fullvæl, at Føroyar ikki kann samanberast við Grønland uttan nærri eftirkanning, men her eru nøkur fá dømir: Stødd: Grønland er umleið 1.548 ferðirnar størri í vídd enn Føroyar (Grønland er 2.166.086 km2 og Føroyar 1.399 km2). Transport: Grønland hevur íalt 150 km av landsvegi og ímeðan meira enn 80% av Føroyum eru samanbundnar við vegum, tunlum og undirsjóvartunlum eru tað bert tveir býir í Grønlandi sum eru samanbundnir við vegi, Ivittuut og Kangilinnguit. Monopol: Í Grønlandi er framvegis lógarásett monopol í summum vinnum, eitt nú innan telefon útbreiðslu og eru leivdir av kongaliga einahandlinum framvegis dominerandi í summum bygdum. Blokkstuðul: Føroyar fer í 2007 at móttaka 615 milliónir í blokkstuðli, ímeðan Grønland fer at móttaka yvir 3,2 milliardir í blokkstuðli. Politisk skipan: Grønland hevur eina yngri politiska skipan enn Føroyar. Grønland fekk ikki heimastýrið fyrr enn í 1979, og ímeðan tað fyri tað mesta eru føroyingar sum starvast í føroysku miðfyrisitingini, eru tað nógv fremmand sum starvast í Grønlendsku umsitingini, serliga danir.

Hesi eru bert nøkur fá dømi um, hvussu ótrúliga nógv øðrvísi samfelagið Grønland er í mun til Føroyar, og sum mugu havast í huga tá samanberingar skulu gerast. Tað ber ikki til bert at fyrihalda seg til eitt einkult fakta, tá samanberingar skulu gerast um so týðandi og yvirornað politisk mál sum eina valskipan, tí ein valskipan er í ávísan mun ein avspegling av samfelagnum.

**Grønland er ikki Føroyar**

Tað er tískil rættuliga ivasamt, um man kann samanbera Føroyar við Grønland sum líka partar og pástanda, at um skipanin við einum valdømi ikki riggar í Grønlandi, so kann hon heldur ikki rigga í Føroyum. Viðkomandi samfelagsligviðurskifti eiga at vera tikin við í slíka samanbering.

Harafturat siga tey, ið eru ímóti einum valdømi, at grønlendskir politikarar eru ónøgdir við hesa skipan og vilja fara aftur til ta gomlu skipanina. Sambært tí veruleika, at tann demokratiski viljin eisini ræður í Grønlandi, og at skipanin framvegis er galdandi í Grønlandi, so passar hetta einfalt ikki. Sjálvandi er tað møguligt, at ein minniluti er ímóti verandi skipan, men ein meiriluti er tað hvørt fall ikki, tí so høvdu grønlendingar havt gjørt neyðugu tillagingarnar.

**Er tað lov?**

Summi mótstøðufólk, ið hava illgruna um at teirra vald møguliga hvørvur, hava ført fram, at Edmund Joensen á ein ella annan hátt forbrýtir seg, um hann leggur uppskotið um eitt valdømi fram. Hetta er ikki so, tí sambært § 22 í stýriskipanarlógini, hevur hvør einstakur tinglimur rætt at leggja fram uppskot um løgtingslóg, og tí er tað beinleiðis lygn, tá ført verður fram, at Edmund Joensen sum tingformaður og løgtingslimur ikki skal hava loyvi at koma við hesum uppskotinum. Um hann ger ímóti onkrari fjaldari politiskari avtalu, tað er so eitt annað mál.

**Seriøsiteturin væntar**

Avgerð um at skipa Føroyar sum eitt valdømi krevur eftir mínari hugsan eina holla politiska og samfelagsliga viðgerð. Slík viðgerð tekur tíð, og kann tað tí tykjast sum um uppskotið hjá Løgtingsformanninum ikki fer at fáa tað neyðugu viðgerðina, sum slíkt mál hevur uppiborið. Løgtingsformaðurin hevði møguliga ynskt, at málið fekk drúgvari viðgerð, men kennir seg kanska noyddan at arbeiða skjótt, tí hann veit, og tað hava vit eisini hoyrt talan um, at einstakir løgtingslimir vilja gera alt fyri at sabotera eina og hvørja viðgerð av hesum málinum.

**Hvat sigur Jógvan við Keldu ?**

Nú havi eg greitt frá nøkrum av mínum sjónarmiðum viðvíkjandi einum valdømi uttan at fara í smálutir, so nú gleði eg meg at fáa nærri at vita frá Jógvan við Keldu, hvør tann politiska hugsjónin og fatanin hjá Fólkaflokkinum er og hví Fólkaflokkurin ikki ynskir eitt valdømi?

# Skulu broytingar gerast í valskipan okkara?

KÁRI P. HØJGAARD
løgtingslimur



Av tí at flestu val ikki hava givið flokkunum umboðan í mun til atkvøðutalið, eru tvey uppskot um broytingar í vallógini, løgd fyri løgtingið í hesum valskeiði.

Í fyrra uppskotinum varð útrokningarhátturin broyttur og talið minkað úr núverandi 7 niður í 5 valdømi. Seinra uppskotið legði upp til, at Føroyar vórðu eitt valdømi.

Eitt triðja uppskot, ið tveir serfrøðingar høvdu tilevnað, varð framlagt fyri løgtingslimum, men heldur ikki hetta uppskotið vann frama.

Hví broyta í vallógina?

Taka vit til dømis úrslitið frá seinasta løgtingsvali, so fekk B við 7503 atkvøðum sjey tinglimir, meðan E við 6890 atkvøðum fekk átta tinglimir.

D við 1461 og H við 1661 atkvøðum fingu ongan umdømisvaldan, men ávikavist 1 og 2 eykatinglimir. Í minsta valdøminum hava 1085 veljarar atkvøðurætt. Teir 1023 veljararnir, ið greiddu atkvøðu, fingu tveir umdømisvaldar tingmenn.

Orðaskifti í løgtinginum um broytingar í vallógini staðfesti, at allir flokkar eru samdir um, at verandi skipan ikki er nøktandi. Ásannandi at so er, hevur løgtingsformaðurin vegna alla tað politisku skipanina tikið stig til at tosa við flokkarnar, hvussu fram skal farast. Løgtingsformaðurin hevur hægstu tign og tekur hetta stig umboðandi Løgtingið. Tí er tað er óvirðuligt, at leggja trýst á formannin, til tess at støðga arbeiðinum.

Demokrati byggir á, at meirilutin ræður. Einasti háttur at fáa ein virðiligan enda á orðaskiftinum um broytingar í valskipanini er, at løgtingslimir eftir bestu sannføring fáa loyvi at atkvøða um uppskotið frá løgtingsformanninum.

# Eitt ella fleiri valdømi einaferð enn

JÓGVAN VIÐ KELDU
løgtingsmaður



At vit liva í kolveltandi broytingartíðum er veruleiki, og at tað fer at ganga skjótari enn, er eisini rætt, men lat málini verða loyst í rættari raðfylgju

Einki er at taka seg aftur í, at vit eru í kolveltandi broytingartíðum. Einki nýtt er í, at tíðir broytast, men ferðin er størri í dag, enn nakrantíð og fer støðugt at økjast.

Tað, sum fyrr var fiskiskapur, landbúnaður og handil hevur lutfalsliga flutt seg yvir á bókliga útbúgving, KST, tænastufyritøkur, og har fleiri hendur vórðu brúktar, hevur útbygda tøknin tikið við. Hetta hevur slept meiri pening í umferð og eitt lættari lív hjá teimum flestu. Brúk er í størri mun fyri fólki við førleikakravdum útbúgvingum.

Peningakervið er broytt, føroyingar gera íløgur uttanlands og útlendingar í Føroyum, m.a. fær frálandavinnan alt størri týdning.

**Bygnaðarbroytingar gjørdar**

Fyrst í tjúgundi øld vóru fáar kommunur í Føroyum men hesar øktust upp í 51, sum øldini leið, fyri aftur seinast í øldini og um aldarskifti at detta niðuraftur á 34 kommunur við ætlanum um einar 7 kommunur, tá fyribils er komið á mál.

Skattakrónurnar og við hesum krøvini til tað almenna vóru fáar, kommunuskatturin lá millum 2 og 5% og landsavgjøldini vóru smá. Peningurin var sum heild smáfallandi.

Eftir seinna krígslok broyttust bæði hugburður og sosialu viðurskiftini og í seinna helmingi av øldini vóru tveir so gott sum totalir húsagangir, meðan til aðrar tíðir gekk upp og niður vinnuliga og við vinnuni, hjá øllum samfelagnum.

Seinastu 40 árini hevur tað almenna, land og kommunur, eins og í londunum uttanum okkum, tikið størri ábyrgd innan sosial- og heilsuviðurskifti, eldra- og barnaansing og ymiskligum øðrum tænstustovnum. Krøvini til tað almenna eru óendalig og tí verður tað almenna drigið til ábyrgd fyri tørvi og kvaliteti av viðgerð. Landið er væl útbygt.

Alt í alt hevur hetta, uttan djúpri hugsanir og kanningar, fingið fleiri av okkara búskapar- og samfelagsfrøðingum, sentralistiskum politikarum og embætisfólkum at krevja eitt sentraliserandi valdømi, soleiðis, at alt skal savnast í høvuðsstaðnum.

**Friður til sentralisering**

Grundgevingarnar eru m.a., at so verður "friður" at reka landspolitikk, heldur enn at stríðast um og leggja íløgur uttan fyri høvuðsstaðarøkið, men at savna alt á einum staði. Tað hoyrir jú til nýmótans samfelagið, tí onkur trýr at meiri dynamikkur verður.

Tá løgtingsformaðurin, sum uttan at blunka brýtur samgonguskjalið, sigur, at málið er sterkar kommunalar eindir og eitt valdømi, hongur raðfylgjan langt í frá saman.

Ídag hava vit eitt sterkt savnað øki. Tað er høvuðsstaðurin. Øll hini økini eru ikki samanløgd enn og tí veik, og sum eg fyrr havi sagt, eisini tá eg var landsstýrismaður, at neyðugt er at leggja saman seinastu kommunur við lóg, fyri at fáa økini styrkt.

Hetta eigur fyrst at gerast, áðrenn tað kemur uppá tal at fáa eitt sentralistiskt valdømi.

**Stýra orðaskiftunum neyvari**

Aðrar grundgevingar eru m.a., at brúkt verður ov nógv tíð í løgtinginum til at tosa um útbyggingar av samferðslu, miðnámsskúlaverki o.a., ístaðin fyri at tikið "veruligar" samfelagsspurningar og –trupulleikar upp, hesum hava vit einum fyri at takka, tað er til eina og hvørja tíð sitandi løgtingsformanni, sum letur tingfólk sleppa at tosa um alt annað, enn tað málið snýr seg um, og ikki klára at stýra fundinum.

At menn sum løgmaður, løgtingsformaðurin og Karsten Hansen nú ynskja eitt valdømi, kann ein gera sær sína hugsan. Politikarar við hesi hugsan uttan fyri høvuðsstaðin kunnu ikki hava hugsað seg nóg væl um, ynskja teir at tæna øllum landinum samfelt.

Eg eri samdur við løgtingsformanninum í, at økini uttan fyri høvuðsstaðin mugu leggjast saman í størri og sterkari eindir, og um ikki við góðum, so við lóg, og tað eigur at verða gjørt nú. Tástandi kunnu vit fara at tosa um víðfevndar broytingar av løgtingsvallógini.

**Suggesión**

Annars minna øll hesi óella illagrundgivnu uppropini um eitt valdømi meg ikki sørt um í 1979, tá iranska fólkið úti á gøtuni í Teheran geylaði, uttan at hugsa seg um, "Latið okkum fáa Khomeini aftur" – "Leingi livi kolveltingin". – Tað endaði í kaos.

At vit liva í kolveltandi broytingartíðum er veruleiki, at tað fer at ganga skjótari, er eisini rætt, men latið okkum loysa málini í røttu raðfylgju.